

**LEYST STARV**

Vit søkja eftir fólki at bera bløð út í Vestmanna.

Ert tú 13 ár, og hevur hetta tín áhuga, so ring á tel 35 14 05

frá kl. 10 - 17
ella send ein teldupost:
utbering@prent.fo

**Prentmiðstøðin**
Smyrilsvegur 13 • Postboks 3314 • FO-110 Tórshavn • www.prent.fo

# Føtur undir egið borð

**Mikukvøldið 14. mars kl. 19.30 skipar Javni fyri fundi í Klingruni í Norðurlandahúsinum.**

Á fundinum verður ljós varpað á bústaðarviðurskiftini hjá fólki við menningartarni.

- Hvussu er støðan á økinum, og hvørji eru framtíðarútlitini?
- Hvat siga tey við menningartarni?
- Hvat siga foreldrini?
- Hvat siga politikararnir?

Fundurin er almennur, og øll eru hjartaliga vælkomin.

## Møtið fjølment

Javni er felag, sum arbeiðir fyri góðum umstøðum til børn, ung, vaksin og eldri við menningartarni. Javni vil fegið hava eitt samfelag, har rúm er fyri øllum, og har øll kunnu hava eitt gott lív út frá egnum fortreytum og ynskjum.

javni
– Virkin og virðismikil

Hoydalsvegur 40 · Postsmoga 1133 · FO-110 Tórshavn · Tlf. 31 48 27 · www.javni.fo

REPROZ

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# Starvsfólk innan tekniska økið



Í næstum letur kommunan upp eina nýggja móttøku, hvørs endamál er at vera eitt væl- og skjóttvirkandi lið millum býráðsumsiting/býráð og borgara.

Í fyrstu atløgu koma 4 fólk at starvast í móttøkuni, harav eitt skal taka sær av tí tekniska økinum, sum við hesum verður lýst leyst at søkja.

Fremsta uppgávan hjá viðkomandi verður at veita borgarum upplýsing og tænastu við denti á tað tekniska økið.
Aðrar uppgávur:

- at hava um hendi dagføring og útskriving av listum, kortum o.ø. tekniskum upplýsingum.
- móttøka og fullfíggjan av umsóknum um byggiloyvi.
- avgreiðsla av smærri byggiloyvum.

Dentur verður lagdur á gott samstarv millum starvsfólkini í nýggju móttøkuni.

Hevur hetta tín áhuga, og hevur tú hóskandi útbúgving innan tekniska økið og hollan kunnleika og royndir á nevndu arbeiðsøkjum, so ert tú kanska persónurin, ið vit leita eftir.

Vit vænta, at tú hevur góðan munnligan og skrivligan málførleika, dugir við teldu og er før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt. Tú mást vera samstarvsviljað/ur og tænastuhugað/ur, og týdningarmikið er, at tú ert opin og fyrikomandi.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya (KAF) og Starvsmannafelagið, lønarflokkur 5.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Jóhann Lützen, móttøkuleiðara, ella Hera M. Hammer býarverkfrøðing, tlf. 41 00 00.

Umsóknir, saman við prógvi, møguligum viðmælum v.m. verða at senda til:

KLAKSVÍKAR BÝRÁÐ
Postsmoga 2
700 Klaksvík

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 16. mars 2007.

Klaksvíkar Kommuna | Nólsoyar Pálsgøta 32 | FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 | Fax. 410001 | klaksvik@klaksvik.fo | www.klaksvik.fo

creð 458006